# Ungdómslegur í Nesvík

**Sosialurin var í Nesvík og vitjaði ungdómarnar, sum hugnaðu sær har. Hóast luttakaratalið var minni enn undanfarin ár, lata fyriskipararnir væl at**



*Leguluttakararnir hugnaðu sær óført í fríløtunum. Her royna nakrir dreingir seg við einum spæla av borðfótbólti.*
*Mynd: Heini S. Kristiansen*

SUMMARLEGUR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Summarlegurnar í Nesvík er j úst farnar aftur um bak á hesum sinni. Tað hava verið nógv fólk virkin í samband við legurnar. Tær flestu hava verið hildnar í Nesvík, men onkur hevur verið úti í onkrari bygd.

Tað skal ein rúgva av sjálvbodnum arbeiði til at kunna hava slíkar legur. Tað hava verið nógvir leiðarar, kokkar, uppvaskarar og náttarvaktir, sum hava ofrað ein part av teirra summarfrítíð fyri legunum.

Sosialurin vitjaði á tí síðstu summarleguni. Luttakaratalið var ikki so høgt sum undanfarin ár, men luttakararnir hugnaðu sær veruliga. Um kvøldið var møti, har ið ein dramabólkur framførdi. Seinni var lovsangs- og vitniløta.

Bjartur Johannesen var høvuðsleiðari á báðum ungdómslegunum, sum er fyri 7.-10. flokk. Hann letur væl at legunum.

- Eg haldi, at tað gekk væl, og leiðararnir hava verið óførir. Luttakararnir hava hugna sær.

Summarlegurnar hjá Heimamissiónini verða aftur næsta summar.



*Ein dramabólkur framførdi á møtinum leygarkvøldið. Seinni var lovsangs- og vitniløta.*
*Mynd: Heini S. Kristiansen*



*Bjartur Fonsdal Johannesen var høvuðsleiðari á báðum ungdómslegum. Hann er væl nøgdur við legurnar.*
*Mynd. Heini S. Kristiansen*

## Grind og springarar sloppin í gjár

Ein flokkur av springarum og ein grind eru sloppu í gjár. Eygað varð borið við springararnar við Kirkjubø og grindina uttan fyri Glyvursnes.

Av løgrelustøðini í Havn siga tey, at ein springarabólkur varð sæddur út fyri Kirkjubø í gjár klokkan 14.15. Talan var einans um nakrar fáar springarar, og sýslumaðurin ráddi frá at royna at fáa rakstur á springararnar.

Úr Runavík veit løgreglan at siga, at ein grind varð funnin klokkan 11.30 út fyri Glyvursnes. Grindin slapp, áðrenn bátarnir vóru komnir rættiliga út til hana, og teir sóu einki til hana aftur, hóast teir leitaðu leingi.

**- HeiniK**

## Filmar skulu læra okkum grannamálini

Í heyst skulu minst 20.000 skúlanæmingar í Norðurlondum læra seg at skilja málini hvør hjá øðrum. Ein margmiðlaundirvísing, sum hevur humor sum tema og filmin sum amboð, skal gera undirvísingina í grannamálum hjá teimum 14 til 19 ára gomlu til veruleika

Norðurlendska átakið kallast "Norden i Bio". FNF, meginfelagið hjá Norrønu feløgunum, og norðurlendsku kunningarstovurnar tóku stig til "Norden i Bio". Mállærarum í øllum Norðurlondum stendur í boði spildurnýtt frálærutilfar til undirvísing í norðurlendsku málunum.

Fimm stuttfilmar eru valdir til DVDin, sum er ein partur av undirvísingartilfarinum. Eisini er ein lærubók gjørd.Filmarnir umboða ymisk sløg av humori, skemti, og leggja upp til kjak um líkskap og frávik í humorinum í londunum. Kjarnin í verkætlanini er málundirvísingin, men ætlanin er eisini at stimbra áhugan hjá teimum ungu fyri norðurlendskari filmslist, mentan, søgu, samleika og samleikafrávik.

Ein stór kanning, sum Norðurlendski mentanargrunnurin gjørdi í fjør, vísti, at tey ungu í Norðurlondunum skilja verri málini hvør hjá øðrum enn tey ungu gjørdu fyrr. Helvtin av spurdu studentaskúlanæmingunum svaraðu, at tey hvørki í barnaskúlanum ella í studentaskúlanum høvdu fingið nakra undirvísing í øðrum norðurlendskum málum enn sínum egna.

Upplýsingar um undirvísingartilfarið eru á heimasíðuni www.nordenibio.org

**- HeiniK**